# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-03-31-69 | Lóg: | Avgerð tikin: 18.11.2009 |
|---|---|---|

## Uppkrevjing av avgreiðslugjøldum


**Samandráttur:**

**Kært er um, at Posta hevur uppkravt gjald fyri avgreiðslu av fráboðan fyri TAKS og av tollrokning fyri TAKS og mvg av nevndu tænastum í samband við tolling av pakka. Skatta- og avgjaldskærnevndin hevur tikið avgerð um at avvísa kæruna við tí grundgeving, at eingin avgerð er frá TAKS, sum kann kærast í hesum føri. Talan er um eitt mál millum Posta og kæraran.**


### Avgerð

**Kært er um,** at Posta hevur uppkravt gjald fyri avgreiðslu av fráboðan fyri TAKS og av tollrokning fyri TAKS og mvg av nevndu tænastum í samband við tolling av pakka.

**Kærarin** førir m.a. fram, at hann ikki metir, TAKS hevur heimild at krevja onnur tænastugjøld enn tey, sum landsstýrismaðurin hevur ásett í kunngerð, og sum eru lýst í kunngerðarblaðnum

Viðlagt er avrit av fráboðan um postsending, har tað framgongur, at Posta hevur uppkravt ómaksgjøld fyri avgreiðslu av fráboðan fyri TAKS kr. 24,00 og avgreiðslu av tollrokning fyri TAKS kr. 36,00 og mvg av hesum gjøldum á kr. 15,00.

**TAKS** gevur kæraranum rætt í sínum páhaldi um, at TAKS ikki hevur heimild at innkrevja tænastugjøldini, og TAKS upplýsir, at tað ikki er TAKS, sum krevur gjøldini inn. Tað er Postverk Føroya, ið krevur gjøldini inn, og tað er somuleiðis Postverk Føroya, ið varðveitir inngjøldini. Peningurin kemur ongantíð til TAKS ella til landskassan. Postverk Føroya hevur brúkt leistin í fleiri ár. Tað harmar TAKS almikið, tí TAKS fær fleiri áheitanir, sum júst hesin kærarin vísir á.

TAKS upplýsir eisini, at TAKS fleiri ferðir hevur heitt á Postverk Føroya um at strika tekstin í skjølunum ”Fráboðan um postsending” og í ”Tollkort”.

**Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini.**
Spurningurin er, um Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur málførið at viðgera hesa kæru.

Sambært § 22, stk. 1 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting viðger Skatta- og avgjaldskærunevndin toll- og skatta- og avgjaldskærur. Sambært § 24, stk. 1 í somu lóg ger nevndin úrskurð um kærur av avgerðum, sum økisskrivstovurnar, kommunalu skattakærunevndirnar, Stýrið ella Toll- og skattaráðið hava tikið.

Í hesum føri er talan um ómaksgjøld, sum Posta uppkrevur av kæraranum, sum er kundi hjá Posta. Ómaksgjøldini eru kostnaður fyri veitingina hjá Posta til kæraran, og er eitt mál millum Posta og kæraran.

Talan er sostatt ikki um avgjøld, sum Posta krevur vegna TAKS, og talan er tí heldur ikki í hesum máli um avgerð hjá TAKS at krevja hesi gjøld.

Tað framgongur av § 22, stk. 1 í løgtingslógini um toll- og skattafyrisiting samanhildin við § 24, stk. 1 í somu lóg, at Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um avgerðir frá økisskrivstovunum, kommunalu skattakærunevndunum, Stýrinum ella Toll- og skattaráðnum.

Tá talan í hesum føri ikki er um avgerð hjá TAKS at krevja tey omanfyri nevndu gjøld, kann málið ikki kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

**Skatta- og avgjaldskærnevndin hevur tikið avgerð um at avvísa kæruna við tí grundgeving, at eingin avgerð er frá TAKS, sum kann kærast í hesum føri. Talan er um eitt mál millum Posta og kæraran.**

Nevndin kann upplýsa, at kærarin kann venda sær til Posteftirlitið fyri at kanna, um Posteftirlitið hevur møguleika fyri at viðgera mál hansara.